Borgarafundur í Leirvík:

# Stórur meiriluti fyri fjørul

**– Vit fingu tað váttað, sum vit hildu, at vit frammanundan vistu – at stórur meiriluti er millum leirvíkingar fyri fjøruloysnini við tunli, sigur stigtakarin til borgarafundin í Leirvík, Filip Hansen**

BORGARAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*

Fríggjakvøldið var vælmøttur borgarfundur í Leirvík, sum Filip Hansen tók stig til.

Hetta var ein stuðulsfundur til bygdarráðið, sum einmælt mælir til, at vegaføringin úr Norðoyatunlinum verður loyst við vegi og tunli oman fyri havnalagið. Hetta metir bygdarráðið vera bestu loysnina, og á fundinum kom fram, at henda loysnin hevur nógv størstu undirtøkuna millum bygdarfólkið í Leirvík.

Uppundir endan á borgarafundinum høvdu leirvíkingar høvi at atkvøða um fjøruloysnina við tunli – og loysnina, sum Landsverk mælir til við vegi omanfyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið. Úrslitið gjørdist, at 165 fólk vóru fyri tunli, 17 fyri vegnum omanfyri bygdina – og 5 atkvøður vóru blankar.

Borgarafundurin var skipaður við pallborði, har allir sjey bygdarráðslimirnir í Leirvíkar kommunu høvdu eina stutta framløgu í part – og síðan høvdu hini trý, sum sótu við pallborðið, Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, Svein Kristiansen, stjóri í NCC, Føroyar og Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, eina framløgu.

Tað var Filip Hansen, sum beyð vælkomin og vísti á, at hann hevði tikið stig til fundin fyri at stuðla bygdarráðnum í Leirvík í málinum at náa loysnini, sum leirvíkingar halda vera ta frægastu.

Eftir framløgurnar høvdu fólk høvið at seta spurningar.

Tað var útvarpsmaðurin, Jón Brian Hvidtfeldt, sum stýrdi fundinum, og tað gjørdi hann við hepnari hond.

Hóast framløgurnar hjá bygdarráðslimunum vóru stuttar, fingu fundarfólkini eina rættiliga greiða ábending um, hvat bygdarráðið ynskir – og hví bygdarráðið ynskir fjøruloysnina við tunli.

Flestu bygdarráðslimirnir harmaðust um, at landsstýrismaðurin ætlar at útseta málið til loysn av vegaføringini í Leirvík, soleiðis at tað ikki verður lagt fram sambært ætlanini.



*Á fundinum kunnaði Svein Kristiansen, stjóri í NCC, um verkætlanina við fjøruvegi og tunli*



*– Eg eri sera væl nøgdur við borgarafundin, sigur stigtakarin, Filip Hansen*

Heitt varð á landsstýrismannin, sum ikki var til staðar á borgarafundinum, um ikki at útseta framløguna, men at leggja málið fram til ásettu tíðina, 15. februar.

Eftir fyrispurningar og svar úr salinum, fingu allir pallborðsluttakararnir høvi til at taka saman um.

Filip Hansen, sum tók stig til fundin, heldur, at borgarafundurin var sera væl eydnaður.

– Vit fingu tað váttað, sum vit hildu, at vit frammanundan vistu – at stórur meiriluti er millum leirvíkingar fyri fjøruloysnini við tunli.

Á borgarafundinum høvdu fleiri sitandi politikarar orðið, bæði samgongu- og andstøðupolitikarar. Flestu harmaðust um og funnust at ólukkuligu støðuni, sum leirvíkingar eru í, nú Norðoyatunnilin letur um um nakrar vikur – uttan, at nøkur avgerð enn fyriliggur um, hvussu vegaføringin til og úr tunlinum verður.

Tað, sum fólk meta sum tað allar ringasta av øllum, er, at politiska avgerðin um, hvussu málið skal loysast, enn ikki er tikin, og nú landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, rør uppundir at útseta avgerðina, eru fólk um at missa mótið.

Filip Hansen fegnast eftir fundin um útsagnirnar hjá politikarunum.

Hann vísir á, at millum samgongupolitikararnar, sum vóru við á fundinum, søgdu javnaðartingmaðurin, Andreas Petersen og sambandstingmaðurin, Alfred Olsen, seg vera fyri at stuðla leirvíkingum. Aftrat teimum høvdu eisini Karsten Hansen og Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum orðið, og teir søgdu seg eisini taka undir við, at leirvíkingar fáa ta loysn, teir ynskja.

Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum og Bill Justinussen úr Miðflokkinum søgdu seg eisini taka undir við hesum.

Teir, sum ikki vóru so heitir fyri aðrari loysn enn henni, sum Landsverk mælir til, vóru í fyrsta lagi Kjartan Joensen, tingmaður Fólkafloksins í Leirvík og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin.

Filip sigur seg fegnast um, at politikararnir góvu til kennar sína støðu á borgarafundinum.

– Eg haldi eisini, at tað var gott, at Kjartan Joensen gav sína støðu til kennar, meðan leirvíkingar høvdu høvi at hoyra, hvat hann heldur um málið, sigur stigtakarin til fundin.

Á borgarafundinum kunnaði Svein Kristiansen, stjóri í NCC, Føroyar, um tilboðið, sum teir saman við J & K Petersen, hava havt frammi um verkætlanina, sum leirvíkingar ynskja.

Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, segði seg eftir hesa kunning vita eitt sindur meira um, hvussu verkætlanin, sum NCC og J & K Petersen siga seg kunna fremja fyri einar 87 miljónir krónur, hongur saman.

– Eg haldi, at borgarafundurin gekk yvir allan "forvæntning", sum Filip tekur til.

Hann sigur seg hava skilt á bygdarráðslimunum eftir fundin, at tey eisini eru sera væl nøgd við fundin.

– Vit høvdu ein góðan, siðiligan og sera væl møttan borgarafund um hetta mál, sum fyllir so nógv hjá øllum leirvíkingum. Eg haldi, at Jón Brian Hvidtfeldt dugdi sera væl at stýra fundinum á ein ógvuliga neutralan og skilagóðan hátt, sigur Filip Hansen, stigtakari til borgarafundin í Leirvík fríggjakvøldið.

# Ferðslutrygdin í Leirvík er hótt



**– Nú Norðoyatunnilin letur upp um minni enn tríggjar mánaðir, er ferðslutrygdin í Leirvík hótt – og leirvíkingar hava orsøk at óttast. Latið ikki hetta gleðiliga frambrot í samferðslukervinum gerast ein sorgarleikur, segði formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

BORGARAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á borgarafundinum í bygdarhúsinum í Leirvík vísti Rúna Sivertsen á, at ferðslutrygd er eitt samspæl millum myndugleikar og ferðandi. Hon fýltist á, at føroyingar eru so aftarliga, tá ið ræður um ferðslupolitiska økið.

Í áhugaverdari framløgu vísti hon á nøkur ítøkilig dømi um, hvat gerast kann fyri at minka um ítøkiligu ferðsluvandarnar, sum koma at standast av, at øll ferðslan úr og til Norðoyatunnilin kemur at ganga eftir bygdavegum í Leirvík í tíðini, áðrenn nakar annar ferðamøguleiki er.

Hon segði, at 1) Landsverk og Leirvíkar kommuna mugu tryggja vegirnar mest møguligt, 2) at neyðugt er at gera forðingar í tann mun, tað ber til, 3) at bileigarar mugu syrgja fyri, at bilar verða rætt parkeraðir, 4) at løgreglan ger átøk, serliga í byrjanini, 5) at skúli og barnagarðar upplýsa og læra børnini um øktu ferðsluvandarnar og 6) at foreldur støðug mugu áminna og ávarða børnini um vandarnar.

– Tað nyttar ikki at krevja av myndugleikunum, um tey ferðandi ikki eisini gera tað, sum rætt er í ferðsluni.

Formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd legði stóran dent á, hvussu týdningarmikið tað er, at bilar verða parkeraðir soleiðis, at teir eru til ampa fyri ferðslutrygdina.

– Eg vil staðiliga heita á øll, sum fara at ferðast gjøgnum Leirvíksbygd, um at vísa størsta varsemi, so hetta gleðiliga frambrot í samferðslukervinum, nú Norðoyatunnilin letur upp um nakrar vikur, ikki verður ein sorgarleikur, segði Rúna Sivertsen.